## Kapping undan kava

Árliga Klaksvíkskappingin í fótbólti, sum skuldi verða 27. februar og 28. februar, er seinkað av nógva kavanum, sum hevur verið, men nú verður hon í staðin 13. og 14. mars. Flytingin hevur annars við sær, at kappingin nú verður munandi veikari, tí upprunaliga skuldu HB, EB/Streymur, Víkingur og KÍ kappast, men nú verða liðini í kappingini B68, ÍF, TB og KÍ.



## Umboðsmannaroynd

Eina ferð um árið kunnu tey fara upp til roynd, sum ganga við einum dreymi ella ynski um at gerast leikaraumboðsfólk. Hesa ferð verður royndin tann 15. apríl klokkan 10, og hon verður í FSF-húsinum í Gundadali. Henda royndin er samstundis sum tilsvarandi roynd er í øllum FIFA-londunum. Freistin at melda seg til royndina, er úti 22. mars.

# Summi eru meira líka enn onnur...

**At ein og hvør er sær sjálvum næstur, gekk sjón fyri søgn í farnu viku, tá 11 av teimum 14 hondbóltsfeløgunum heittu á Hondbóltssambandið um vaksa bestu deildirnar upp í sjey ella átta lið**




**Hilmar Jan Hansen**

Ofta verður tikið til, at øll skulu vera líka fyri lógini og at mannamunur ongantíð eigur at verða gjørdur. Hetta eru eisini vís orð, sum kunnu vera sera nyttug og gagnlig, verður eisini gjørt eftir teimum. Orð hava tað við at vera eitt sindur tómlig, um ikki gerðir liggja aftanfyri eisini. Onkur, ið dugir væl at hugsa, hevur so aftur spælt sær við hesi vendingini um, at »øll skulu vera líka«, og burtur úr tí er so komin ein onnur vending um, at »summi eru meira líka enn onnur…«

Soleiðis hevur tað eisini sæð út síðstu vikurnar, nú alsamt fleiri hondbóltsfeløg eru farin at tosa um, at nú skulu bestu deildirnar hjá kvinnum og monnum víðkast, so ikki verður neyðugt við nakrari niðurflyting í ár. Hetta ljóðar óivað skilagott í mongum oyrum, men verður hugt eitt sindur aftur um tað, ið hesir tankar botna í, gongur sjón fyri søgn, at ein og hvør er sær sjálvum næstur.

Fólk hava lovprísað landskappingini hjá monnunum, tí nú var hon blivin so spennandi, sum hon kanska ongantíð fyrr hevur verið tað. Ikki færri enn fimm lið kunnu koma í FM-finaluna ímóti Neistanum, sum hevur flogið væl hægri enn øll hini, og – ups, so er tað líka eitt aftrat: Tað ber jú eisini til, at okkurt av hesum fimm liðunum ikki bara endar uttan fyri finaluna, men enntá uttan fyri bestu deildina!

Tað er nokk so undrunarvert, at hesir tankar nú brádliga skuldu gerast so átroðkandi, tí tá tað fyrst í kappingini bara var KÍF, sum sá út til at vera í niðurflytingarvanda, var tað ikki ein kjaftur, ið segði eitt orð um at umskipa kappingina. Men so skjótt sum tað snúði seg um, at møguliga VÍF ella Kyndil kundi flyta niður, og kanska eisini, at bæði hoyvíkingar og strandingar vóru í sama vanda, so mátti okkurt álvarsligt gerast – og tað skjótt eisini…

Nakað tað sama hevur støðan verið í kvinnukappingini, har tað jú hevur verið VB, ið hevur verið í vanda. Tað hevur VB verið alt kappingarárið, so tað er einki nýtt, men fyri tað hevur eingin fyrr sagt eitt orð um, hvussu umráðandi tað er, at »hondbóltsfamiljan ikki má minka« og alt hetta blabbið, feløgini nú brádliga koma fram við – bara tí tað brennir undir reyvini á teimum sjálvum!

Óivað kann tað vera skilagott at hava sjey ella átta lið í teimum bestu deildunum, men tað var nú stuttligt, at so mong feløg skuldu vera so samd, at tey máttu fundast mitt í viku fyri at fáa sent hesa góðu áheitan. Nógv kann sigast um tað, men fyrst og fremst er hetta ein dupultmoralur, ið veruliga vil nakað!

# Venja seg við vind og regn

**Landsliðsvenjarin hjá Norðurírlandi, sum altíð hevur trupulleikar á útivølli ímóti smátjóðum, stúrir fyri vølli og veðri, tá norðurírar í komandi EM-undankappingini skulu til Føroya**




**Hilmar Jan Hansen**

At tað verri enn so altíð gongst eftir vild, tá Norðurírland spælir á útivølli ímóti smærri tjóðum, kom til sjónd-ar mikukvøldið, tá Norðurírland á útivølli í Tirana tapti 1-0 fyri Albania. Eftir dystin heftu norðurírskir miðlar seg við, at vøllurin var ótrúliga vánaligur og at spælandi var ikki á honum.

Hetta sama hevði norðurírski landsliðsvenjarin, Nigel Worthington, longu gjørt vart við undan dystinum, men mótvegis fjølmiðlunum, ið hildu vánaligu vallarumstøðurnar vera eina orsøk, helt hann ikki, at tað gjørdi allan munin, tá norðurírar vóru á útivølli.

– Vit vita einki um, hvussu standurin verður á vøllunum í Estlandi og Føroyum, tá vit koma hagar. Sjálvur leggi eg einki í, um tað er regn ella vindur, sum um Norðurírland hvørki kennir til regn ella vind. Í mínum eygum er munurin heilt einfalt, at mentali hugburðurin hjá okkum á útivølli ikki er nóg góður.

– Úrslit okkara á útivølli hava verið vánalig, og soleiðis hevur tað verið í áravís. Men eg ætli mær at venda hvørjum steini, so eg kann finna útav, hvussu vit fáa rættað hetta. Og tá vallarumstøðurnar annars ikki eru so góðar, sum vit kundu ynskt okkum, mugu vit bara royna at fáa sum frægast burturúr.

Umframt Norðurírland, eru Italia, Serbia, Slovenia og Estland í bólki saman við Føroyum í komandi EM-undankappingini, sum ætlandi byrjar í september mánaði. Enn er ikki greitt, hvussu dystarskráin fer at síggja út.



**Brian Kerr hevur tikið 20 spælarar út til vinardystin ímóti Íslandi um tvær vikur**

Mynd: Kjartan Þorbjörnsson/Morgunblaðið

# Úttøkan til Íslandsdystin

Hóast stóru landsliðshóparnir blivu nevndir sum ein orsøk til, at landsliðið var við til at geva roknskapinum hjá Fótbóltssambandinum fyri í fjør slagsíðu, sæst tað ikki aftur í ársins fyrstu úttøku, nú landsliðsvenjarin, Brian Kerr, hevur tikið hópin út til dystin ímóti Íslandi um tvær vikur.

Tilsamans hava 20 spælarar fingið landsliðsboð til dystin, sum – eins og í fjør – verður spældur í Kórinnhøllini í Kópavogi. Liðið hevur nakað at liva upp til, tí í fjør eydnaðist fyri fyrstu ferð nakrantíð Føroyum at vinna á Íslandi, og ta ferðina vóru eisini nógvir av teimum við, sum nú aftur hava fingið boð.

Úttikni hópurin er hesin: Fróði Benjaminsen (HB), Jákup á Borg (B36), Egil á Bø (EB/Streymur), Atli Danielsen (Roskilde), Jóhan Troest Davidsen (NSÍ), Jóan Símun Edmundsson (Newcastle), Atli Gregersen (Víkingur), Einar Hansen (NSÍ), Rógvi Jacobsen (ÍF), Meinhardt Joensen (B36), Bogi Løkin (Frem), Vagnur Mohr Mortensen (HB), Christian Restorff Mouritsen (B36), Gunnar Nielsen (Manchester City), Jónas Þór Næs (Frem), Andreas Lava Olsen (Frem), Súni Olsen (Víkingur), Jan Ingi Petersen (NSÍ), Símun Samuelsen (HB), Høgni Zachariasen (ÍF).

hil



**Norðurírski landsliðsvenjarin, Nigel Worthington, vil ikki skylda upp á veður, vind og vánaligar vøllir, tá hann skal finna orsøkina til, at Norðurírland sjáldan stendur seg væl á útivølli**